# Petsi til Føroya at syngja



KONSERT

Petsi Tvørfoss fer 17. apríl at hava sína fyrstu veruligu konsert í Føroyum nakrantíð. Songkvinnan úr Gøtu, sum hevur búð í Danmark nógvu seinnu árini, var við í danska Grand Prixnum fyrr í ár, og nú skal hon so syngja fyri føroyingum.

– Eg gleði meg ótrúliga nógv til at koma heim at syngja. Hetta verður fyrstu ferð, at eg veruliga hava eina konsert í mínum egna navni, sigur Petsi.

Hon fer at syngja coverløg, sum hon hevur sungið nógv seinastu árini. Hesar sangir hevur hon roynt at gjørt til sínar egnu.

Saman við Petsi koma fýra danskir tónleikarar til Føroya at spæla saman við henni. Hetta eru tónleikarar, sum hon vanliga spælir saman við.



# Konsert og skeið um suzuki frálæruháttin

TÓNLEIKUR
*Tíðindaskriv*

Suzukifelag Føroya - ið er eitt felag fyri tónleikalærarar og næmingar, ið nýta Suzuki frálæruháttin - hevur í hesum døgum vitjan av Koen Rens, Wilfried van Gorp og Jeanne Janssens, ið eru violinlærarar úr Belgia

Í hesum sambandi vera verkskeið hildin í Vestmanna og í Tórshavn.

Mikudagin 7. apríl klokkan 19 verður konsert Norðurlandahúsinum, har næmingar og lærarar fara at framføra tilfarið, arbeitt hevur verið við í samband við verkætlanina. Konsertin er ókeypis.

# Søkja eftir nýggjum mentanarleiðara

**Klaksvík:** Klaksvíkar Býráð søkir nú eftir leiðara til nýggja mentanardeild í býráðsumsitingini.

Leiðarin skal taka sær av málum innan skúla- og mentanarøkið, og harvið verða fyrisiting hjá mentanarnevndini í býráðnum. Mentanardeildin verður í fyrstu syftu mannað við bara einum fólki, og umsóknarfreistin til starvið er 6. mai.

Klaksvíkar kommuna hevur ikki havt mentanardeild burtur av, síðani tað varð noytt at gera stórar sparingar í býráðsumsitingini fyrst í nítiárunum.

# Havnar Bjargingarfelag fekk LC Tórshavn virðislønina 2004

– Mong eru dømini um, at fólk frá bjargingafelagnum bæði hava brúkt arbeiðstíð og frítíð sína til tess at fremja eitt starv, sum ikki altíð er vandaleyst. Hetta verður gjørt uttan at hugsa um aðra samsýning enn, at hjálpin vónandi er til nyttu og í summum førum enntá kann bjarga mannalívum.

Eitt tað seinasta dømið var, tá ið leitað varð eftir manni í Nólsoyarfirði í januar í ár.

Á fundi í LC Tórshavn hóskvøldið 1. apríl varð avdúkað, hvør fekk LC Tórshavn virðislønina 2004.

Virðislønin verður latin einstaklingi ella felag, sum hevur gjørt okkurt sum gagnar Tórshavnar býi.

Í ár varð so virðislønin latin Havnar Bjargingafelag við hesi grundgeving:

Uttan at gera tað stóra hóvastákið burturúr hevur Havnar Bjargingafelag síðan stovnanina í 1957 verið ein hjálparfelagsskapur, sum óløntur hevur veitt borgarunum í Havnini og her á leiðum trygd fyri, at hjálp verður veitt, tá ið á stendur.

Mong eru dømini um, at fólk frá bjargingafelagnum bæði hava brúkt arbeiðstíð og frítíð sína til tess at fremja eitt starv, sum ikki altíð er vandaleyst. Hetta verður gjørt uttan at hugsa um aðra samsýning enn, at hjálpin vónandi er til nyttu og í summum førum enntá kann bjarga mannalívum.

Eitt tað seinasta dømið var, tá ið leitað varð eftir manni í Nólsoyarfirði í januar í ár.

Havnar Bjargingafelag fær tí handað LC Tórshavn virðislønina 2004 fyri ósjálvsøkna arbeiðið, ið limir felagsins veita borgarunum.

Vegna felagið tók Jens Hansen, formaður, ímóti heiðursskali og einum kekki uppá kr. 3.000.

# Páskastevna í Ítróttarhøllini á Hálsi

**Aftur í ár verður stór páskastevna í Ítróttarhøllini á Hálsi, har m. a. Eivind Frøen úr Noreg og David Meader úr Onglandi koma at taka lut. Eisini verður norski lovsongsleiðarin Rudy Myntevik við á stevnini**

PÁSKASTEVNA
*Tíðindaskriv*



Annað hvørt ár verður skipað fyri páskastevnu í ítróttarhøllini á Hálsi. Stevnan hevur verið ein fastur táttur annað hvørt ár síðani fyrst í 80' árunum. Vanliga verða stevnurnar sera væl vitjaðar við fólki úr nærum øllum samkomum og trúðarrætningum í Føroyum.

Luttøkan í ár verður umframt kend nøvn úr Føroyum eisini Eivind Frøen úr Noreg, sum síðani fyrst í 70' árunum hevur vitjað her ótalligar ferðir til møtirøðir, stevnur og familjulegur. Hann er m.a. kendur fyri sín serliga livandi og eyðmjúka hátt at bera boðskapin fram, tó utan at balla hann inn.

Hin talarin í ár verður tann um okkara leiðir minni kendi David Meader úr Onglandi. David, sum eftir lokna útbúgving við universitetið í 1984, varð kallaður til arbeiði millum muslimar, las víðari guðfrøði og millumlanda mentan á All Nations Christian College við London. Hann giftist Else í 1989 og arbeiddi til 1995, tá ið hann fór at starvast fyri WEC (Worldwide Evangelisation for Christ). Í 1996 byrjaðu tey sína tænastu í Indunesia og vóru við til at senda trúboðarar inn í Kina, mið Asia, mið Eystur og vest Afrika. Í 2000 vórðu tey biðin um at leiða eitt WEC team til Eystur Timor í sambandi við arbeiði, leiðsluvenjing og samfelagsvirksemi.

David og Else Meader fluttu aftur til Onglands í 2003.

Í ár verður eisini norski lovsongsleiðarin Rudy Myntevik ein av luttakarunum á páskastevnuni við sangi og lovsongi. Rudy, sum áður hevur givið fløgu út, er sera virkin á sangøkinum í Noreg.

Um páskirnar koma gestirnir úr Noreg og Onglandi at taka lut bæði til morgunmøtir, evangelisk møtir og bíbliutímar. Eisini verða serlig tiltøk fyri tey ungu. Langa fríggjakvøld verður eitt serligt Teenagekvøld, leygarkvøldið eitt lovsongskvøld og Páskakvøld eitt sangtiltak, har kend nøvn innan føroyska gospelheimin verða við. Páskadag verður familjumøti, sum ætlað er børnum og familjum teirra.

Tað er Meinigheitin í Hoyvík, ið skipar fyri páskastevnuni, sum verður í døgunum 8. til 12. apríl 2004 í Ítróttar- og Samkomuhøllini á Hálsi í Havn. Stutt fyri páskirnar verður skráin lýst nærri í bløðunum. Øll tiltøkini í høllini á Hálsi eru ókeypis, har øll eru vælkomin.

# Kirkjugarðar og fólkateljingar á alnetið

**170 fólkateljingar eru nú tøkar á heimasíðuni hjá ættargranskingarfelagnum KT-slekt. Felagið, sum hevur 350 limir, arbeiðir í løtuni við at leggja yvirlit yvir allar kirkjugarðar á internetið**

ÆTTARGRANSKING
*Tíðindaskriv*



*Nýggja búmerkið hjá felagnum, sum Ole Wick hevur gjørt*

Ættargranskingarfelagið KT Slekt hevði aðalfund seinasta vikuskifti. Á skránni varð formansfrágreiðing, roknskapur og nevndarval. Fundurin varð hildin á Landsskjalasavninum, har víst varð runt eftir fundin.

Í formannsfrágreiðingini segði Göran Wennerstrøm millum annað, at nú eru 170 fólkateljingar innskrivaðar og lagdar á heimasíðuna til limirnar at granska í. Hetta svarar til meira enn ein fjórðingur av øllum fólkateljingum sum eru tøkar á Landsskjalasavninum.

Felagið hevur aftur í vetur hildið skeið fyri sínum limum fyri at leggja teimum lag á at skriva fólkateljingar inn. Nógv fólk situr í løtuni og skrivar inn, men enn mangla onkrar bygdir - serliga í norðoyggjunum.

Á limalistanum eru í løtuni um 350 limir og tað legst alsamt til. Við seinasta aðalfund vóru limirnir 250 í tali.

Av øðrum sum felagið hevur arbeitt við seinasta árið segði formaðurin frá um ætlanina at fáa teldutókt yvirlit yvir allar kirkjugarðar í Føroyum. Bræv er sent øllum kommunum í landinum. Nakrar hava svarað og sent inn yvirlitið til felagið. Teir fyrstu kirkjugarðarnir eru lagdir á heimasíðuna, meðan hinir verða lagdir út so hvørt teir koma felagnum í hendi.

Av tí at Internetið er einasti háttur, ið felagið samskiftir við sínar limir, hevur nevndin gjørt av at gera íløgu í nýggja heimasíðu. Hendan verður tøk um 2 mánaðir.

Formaðurin greiddi eisini frá nýggja búmerkinum, sum Ole Wick á Team85 hevur teknað. Búmerkið er teknað við keltiskum íblástri og kann ímynda eina rót, har ein familja greinar seg út frá. Tað kann eisini ímynda ein av teimum serkendu keltisku krossunum.

Formaðurin, Sofus Johannesen og Steinbjørn í Dali stóðu fyri valið. Teir blivu allir afturvaldir. Hinir nevndarlimirnir eru Hans Suni Jensen og Pól Adrian Hansen.



# Biker-Jens í Suðuroynni

**Umleið klokkan 15 seinnapartin fríggjadagin rullaðu tríggjar Harley Davidson súkklur í land av Smyrli á Drelnesi. Biker-Jens og Harley-umboðsmaðurin í Føroyum, Ove Ritter, taldust millum førararnar. Á bryggjuni tóku bikarar í Suðuroynni ímóti stóru sjónvarpsstjørnuni á Harley súkkluni**

BIKER-JENS
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Væl og leingi varð lýst við, at Biker-Jens byrjaði síni show í Føroyum í Suðuroynni. Tá Jens kom í land á Drelnesi, tóku eini 10-15 menn og kvinnur á motorsúkklum ímóti honum.

Jens hevði ikki havt sjóverk á túrinum um Suðuroyarfjørð, hóast veðrið ikki júst var nakað at reypa av.

Lagt var beinanvegin til brots við einum túri suður eftir oyggj – til Vágs á Vágseiðið at njóta vøkru náttúruna har, og so norðeftir aftur í Klubban á Tvøroyri, áðrenn showtime í Trongisvágshøllini klokkan 19.

Seinni um kvøldið var Biker-Jens at hitta í Klubbanum á Tvøroyri.

Jens veit eitt sindur um Føroyar. Í fólkaskúlanum skrivaði Jens og floksfelagar uppgávu um Føroyar og hevði hann tá brævasamband við gentu av Tvøroyri, men ikki á ferðini í Suðuroy.

Men Jens hitti beinanvegin felagar í føroyska motorsúkkluheiminum og sera fyrikomandi er hann og dugir væl at tosa við tey, ið koma á mál við hann.

Leygarmorgun gekk leiðin aftur norður um fjørð – the show must go on!



*Tá Jens kom í land á Drelnesi, tóku eini 10-15 menn og kvinnur á motorsúkklum ímóti honum*



*Seinnapartin fríggjadagin var Biker-Jens í Suðuroynni og vitjaði. Millum annað varð farið ein túr eftir oyggj til Vágseiði, at njóta vøkru náttúruna har*

# Jákup H. Lützen vinnur tónlistakapping

**Føroyingurin Jákup H. Lützen var um vikuskiftið ein av trimum vinnarum í tónleikakappingini »Kammertónlist til Framtíðar« í Íslandi.**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Leygardag og sunnudag millum klokkan 10.00 og 18.00 valdi klassiski tónlistabólkurin KaSa 3 vinnarar í kappingini »Kammertónlist til Framtíðar«. Ein av hesum trimum var 15 ára gamli violinleikarin Jákup H. Lützen.

Hini vóru íslendsku Arnbjørg Maria Danielsen, sopran sangari, og Elfa Rún Kristinsdóttir, violin.

Konsertirnar vóru á Ráðhúsinum í Reykjavík. Spældur var tónleikur eftir Händel, Heyden, Jón Ásgeirsson, Vivaldi og Schuman. KaSa er kamarbólkur við fimm limum.

Jákup H. Lützen verður mettur at vera sera dugnaligur og er vanur við klassiskan tónleik, men er líka vandur innan fólkatónleikin. Hann er eisini yngsti limurin í Føroya Symfoniorkestri.


